»Med Skrivelse af 12. Oktober d. A. fra Generaldirektoratet for Post- og Telegrafvæsenet er hele Radioordningen paa Færøerne taget op til samlet Drøftelse. Der er al Grund til fra Lagtingets Side at tage den af Generaldirektoratet skitserede Ordning op til velvillig Overvejelse. Man har fra Telefonvæsenets Side været klar over, at hvis Energien i Telefonvæsenets Sender i Thorshavn skulde forøges, og Benyttelsen af den udvides, vilde man blive nødt til at flytte Senderen bort fra Telefonstationen (se Lagtingstidende 1936, den ordinære Samling, Side 69, Linie 3 fra oven). Saa snart der fra Telefonvæsenets Side er Tale om Oprettelse af en særlig Radiofonistation til et (eller flere) Senderanlæg, betyder det forøgede Betjetjeningsudgifter. Naar man ser rationelt paa Forholdene, vil man kunne indse, at en samlet Ordning af hele Radiospørgsmaalet paa Færøerne maa betyde en Besparelse i Forhold til Effektiviteten eller til den Nytte, man vil kunne faa af Anlæggene. Spørgsmaalet om Radiotelefon til Suderø og til København (og Reykjavik) beror i allerhøjeste Grad paa, hvormeget man mener at kunne ofre paa Anlægget og paa den aarlige Drift. Ligeledes maa man gøre sig klart, hvem der økonomisk skal hæfte for saavel Byggeomkostningerne som de aarlige Driftsudgifter. Der maa man nærmest gaa ud fra, at der kun bliver Tale om Staten og Lagtinget.

Generaldirektoratet berører i overmævnte Skrivelse Spørgsmaalet om Koncessionsforholdene og henviser i saa Henseende til Forhandlingerne med Det Store Nordiske Telegrafselskab, dengang Radiotelefonforbindelsen Danmark—Island blev oprettet. Et tilfredsstillende Resultat af en lignende Forhandling er selvfølgelig en Forudsætning for den skitserede Ordning af Radioforholdene.

En Radiotelefonforbindelse til Suderø saavel som til København (og Reykjavik) forudsætter, at der findes et Telefonnet til Disposition paa Færøerne. Da alt, hvad der findes af Telefonlinjer paa Færøerne henhører under Telefonvæsenet, der ejes af Lagtinget, vil en Ordning som den skitserede under alle Omstændigheder berøre Telefondriften. Man vil kunne henvise til, at ved Slutningen af Sommeren 1938 vil Telefonvæsenet antagelig have et forholdsvis godt udbygget Jordkabelnet i Thorshavn, der forgrener sig temmelig langt ud i Periferien af Byen. Paa Tveraa findes der kun Jordkabler paa den østlige Side af Trangisvaagfjorden, medens Linierne fortsætter i Luftledninger paa den vestlige Side af Fjorden, hvor man maa antage, Direktoratet har tænkt sig Radiotelefonstationen paa Suderø anbragt for at komme bort fra det 400 m høje Fjeld Øst for Tveraa Bygd.

Ved Thorshavn maa man tænke sig den fælles Bygning for Senderstationerne anbragt i Nærheden af en Landevej, og hvis man som angivet i Direktoratets Skrivelse skal holde den mindst 1 à 2 km borte fra Modtagerstationen i Byen, maa man nærmest tænkte sig den anbragt «uppi á Varða» (Afst.: ca. 2 km) eller «á Velbastaðhálsi» (Afst.: ca. 4 km). En rigelig Forsyning af Linier »uppi a Varða« vil gennemføres uden uforholdsmæssig store Udgifter for Telefonvæsenet, naar Jordkabelnettet i Thorshavn først er udbygget. Til »Velbastaðháls« vil Linieforsyningen koste noget mere. Sendestationerne vilde i Henhold til foranstaaende komme til at lige i en Højde over Havet paa mindst 200 m. Kraft til Senderanlægget paa Suderø kan man faa forholdsvis billig fra det kommunale Elektricitetsværk. Ved Thorshavn maa man forudsætte bygget et særligt Kraftanlæg i Sendestationernes Bygning, da saavel Prisforholdene som Spændingsfald paa Ledningerne sikkert vil stille sig hindrende i Vejen for Kraftaftagning fra det kommunale Jævnstrømselektricitetsværk.

Generaldirektoratet anslaar de aarlige Driftsudgifter paa et samlet Anlæg (Suderø og København) til ialt ca. 60.000 Kr., herunder Forrentning og Amortisation af Anlægskapitalen. Anlægget vil selvfølgelig ogsaa give en vis aarlig Indtægt, men det vil være uhyre vanskeligt paa Forhaand at anslaa denne Indtægt, da den sikkert vil afhænge stærk af de Takster, man vil benytte. Det eneste Grundlag, man har at holde sig til, er Omsætningen gennem den nuværende Suderøforbindelse paa færøsk Omraade. For den nordgaaende Trafiks Vedkommende synes den maanedlige Omsætning at svinge mellem ca. 500 til ca. 700 Kr. Hvis der etableres en tilfredsstillende Radiotelefonforbindelse, maa man antage, at Omsætningen omtrent vil kunne fordobles, d. v. s. at man i nord- og sydgaaende Retning vil kunne omsætte ca. 2400 Kr. pr. Maaned eller ca. 28.800 Kr. om Aaret. De Indtægter, der kan indtjenes gennem en Telefonforbindelse til Danmark og Island samt til Skibe, vil man ikke paa Forhaand kunne udtale sig om. Man kunde maaske danne sig et Skøn derover ved at undersøge, hvormeget der omsættes paa Danmark—Islandsforbindelsen.

Selvfølgelige maa man sige, at Rentabiliteten af det samlede Anlæg er noget tvivlsom, men man mener dog, at den er værd nøjere at undersøge.«

Efter at have anført foranstaaende, finder Udvalget Anledning til at fremsætte følgende:

Det kan formentlig næppe være Tvivl underkastet, at man, stillet overfor Valget: Kabel- eller Radiotelefon, naar Talen er om en Telefonforbindelse Thorshavn—Suderø, afgjort maa foretrække en Radiotelefonforbindelse. De Erfatinger, man har gjort med Hensyn til Brugen af Kabler her paa Øerne, specielt vedrørende Suderøforbindelsen, taler afgjort imod fortsat Brug af Kabler, selvom man vælger den gunstigst mulige Beliggenhed som fra Tveraa lige ud af Trangisvaagfjorden og nordpaa ca. 10 km Øst for Lille Dimon til Husevig, hvorved man mener at opnaa temmelig gode Bund- og Strømforhold, og ikke som sidst fra Skarvenes til Sandvig. Kabelforbindelsen har vist, at en saadan foruden at være betydelig dyrere at anskaffe (ca. 500.000 Kr.) ogsaa grundet paa Kablernes korte Levetid er dyre i Driften.

Da denne Sag uomtvistelig har en tet nær Tilknytning til Amtskommunens Telefonvæsen, vil det kun være naturligt, at Telefonvæsenet efter Evne bidrager til en forsvarlig Løsning, ligesom betydelige Tilskud fra Staten sikkert vil være nødvendige for Sagens Gennemførelse. Det er maaske derfor ikke af Vejen, — da Løsningen af nærværende Sag i sidste Instans bliver et Spørgsmaal om Penge — i denne Forbindelse at indskærpe Nødvendigheden af i Fremtiden i højere Grad end hidtil at anvende de ved Telefonvæsenet indtjente Midler enten kun til videre Udbygning af selve Telefonanlægget eller til Løsning af Opgaver, der som de foreliggende naturlig sorterer under Telefonvæsenet. Man kan saaledes paapege, at skal Telefonvæsenet blive i Stand til at imødekomme foreliggende og lignende berettigede Krav, kan man ikke fortsætte med at yde Laan og Tilskud til Formaal, der maa siges at være Telefonvæsenet som saadant helt uvedkommende. Man kan saaledes nævne, at der fra Telefonvæsenet til Dækning af Underskudet ved Driften af Kystbaaden »Smiril« ialt er ydet ca. 60.000 Kr. ligesom der til Sygehuset i Klaksvig er ydet et Laan paa 15.000 Kr. Hertil kommer, at Driftsoverskudet for Telefonvæsenet ganske naturligt nu er betydelig mindre end før. Medvirkende hertil er bl. a. Lønordningen af

1936, der paaførte Telefonvæsenet en yderligere Udgift paa ca. 11.000 Kr. til Lønning af Bygdestationerne.

Der kan formentlig ikke være Tvivl om, at Færø Amtskommunes Telefonvæsen alene ikke magter økonomisk den foreliggende Opgave, selvom den begrænses til kun at omfatte Forbindelsen Thorshavn—Suderø. Paa den anden Side maa Endemaalet være en Forbindelse København—Færøerne—Reykjavik, og selvom man dennegang kun skulde bestemme sig for førstnævnte Forbindelse, maa det i alle Tilfælde være rigtigt at indrette Bygninger og Ledningsanlæg saaledes, at de ogsaa kan tjene en eventuel senere Forbindelse med København.

Det, der foreligger i Generaldirektoratets Skrivelse, er en skitseret Plan for de to Radiotelefonforbindelser: Thorshavn—Suderø og København—Færøerne. Det er efter Udvalgets Skøn hverken tilraadeligt eller muligt paa foreliggende Grundlag at tage endelig Stilling til nævnte Forbindelser. Inden dette kan ske, vil det være nødvendigt — som fremhævet af Driftsbestyrer Zachariasen — at der skaffes Klarhed over forskellige herhenhørende Forhold, saaledes at Sagen ligger fuldt belyst. Der maa saaledes skaffes Klarhed over

1) under hvilke Betingelser Anlægget kan oprettes (Koncessionsforhold),
2) hvordan og under hvis Ansvar Anlægskapitalen skal tilvejebringes samt
3) hvem der tager det økonomiske Ansvar for Driften (Indtægter og Udgifter) og i Tilfælde af en Deling: hvordan denne skal foregaa,
4) under hvilke Betingelser Telefonvæsenets Linjer benyttes til Viderebefordring af Radiosamtaler og Radiotelegrammer i Tilfælde af, at Telefonvæsnet ikke bliver Indehaver af Radiotelefonanlæggene.

Man bør fra Lagtingets Side først søge alle disse Forhold klarlagt, da det som bekendt er Staten, der har Eneret til at drive Radiofonistationer paa Færøerne og som Følge deraf kan meddele andre Ret dertil, og da det er Store Nordiske Telegrafselskab, der har Koncession paa de Forbindelser, der her er Tale om. Man gør i denne Forbindelse opmærksom paa, at Telegrafisenderne tænkes samlet under samme Tag som Radiotelefonsenderne, og Modtageanlæggene tænkes stillet op paa den nuværende Radiostation (Telegrafstationen). Tinget bør derfor formentlig gennem vore Rigsdagsrepræsentanter søge Forhandling med Generaldirektoratet for Post- og Telegrafvæsenet og med det Store Nordiske Telegrafselskab angaaende de omtalte Forhold, og i Tilfælde af et gunstigt Resultat af Forhandlingerne foranledige udarbejdet et detailleret Projekt over den samlede Radioordning.

Endelig er der under 1. Behandling af nærværende Sag i Tinget fremført, at Radiofonien i det egentlige Kongerige, der raader over store Pengemidler, i adskillige Byer nede i Danmark har oprettet de saakaldte »Studier«, hvorfra Foredrag, Reportage vedrørende Sport o. l. kan transmitteres over Kalundborg Radio. Det er formentlig ikke udelukket, at Radiofonien i Danmark ogsaa er interesseret i at faa oprettet et Studie her paa Øerne og eventuelt være villig til at yde en passende økonomisk Støtte til Virkeliggørelse heraf.

Først naar alle de her anførte Forhold ligger klart belyst, bør Lagtinget tage Stilling til Sagen.

Forslag.

Landsnevndin i Forbindelse med Telefonnevndin bemyndiges til under Henvisning til det i Betænkningen anførte at føre de videre fornødne Forhandlinger, eventuelt ved vor Rigsdagsrepræsentanter, med Ministeriet for offentlige Arbejder og Store Nordiske Telegrafselskab samt Danmarks Radiofoni, hvorefter Sagen atter vil være at forelægge for Lagtinget til næste ordinære Samling.

Tann 10. desember varð uppskot nevndarinnar samtykt við 24 atkvøðum—0.

---

34. Gjald fyri telefonsamanstillingar(6/IV)[1]

Telefonnevndin framlegði soljóðandi **nevndarálit**:

Í tingsetuni 1936 vóru tvær umsóknir um hægri gjald fyri samanstillingar til viðgerðar á tingi, ein frá sóknarstýrinum fyri Viðareiðis kommunu um at hækka hetta gjald fyri støðina í Hvannasundi, og ein frá støðini á Oyrareingjum.

Samtykt var:

1) at lata málið upp í hendurnar á millumtinganevndini, sum til komandi tingsetu skuldi skaffa til vegar eitt hóskandi grundarlag fyri eini lønskipan viðvíkjandi samanstillingum.

2) Millumtinganevndin var biðin um at kanna eftir og, um orsøk var til tess, fyribils at hækka um hetta gjald hjá telefonstøðunum á Oyrareingjum og í Hvannasundi.

Síðan hevur málið verið til viðgerðar í millumtinganevndini, og hevur hon samtykt, at støðin á Oyrareingjum fyribils skal hava 50 kr. ekstra, av tí at samanstillingararbeiðið er økt so mikið a hesi støðini, meðan spurningurin viðvíkjandi Hvannasundi er burturdottin, tá Hvannasund ikki meira er samanstillingarstøða.

Umframt hesar tvær áðurnevndu støðir hevur millumtinganevndin eisini viðgjørt samanstillingarspurningin viðvíkjandi *Vestmanna—Kvívík*, og skjýtur nevndin upp, at tær 400 kr., sum Vestmanna nú fær fyri samanstilling, verða býttar millum hesar støður, hvør við 200 kr. fyribils, av tí at Kvívík hevur yvirtikið minnst helvtina av samanstillingunum frá Vágum. Aftaná at millumtinganevndin hevði tikið hesa støðu, hevur fyristøðukvinnan

[1]) Sbr. Løgtingstiðindi 1936, bls. 73.

fyri Vestmanna telefoncentral, Olvina M. Christiansen, í brævi til tingið, dagsett 4. novbr. í ár, kæra seg um hesa viðgerð og heldur fram, at Vestmannastøðin eigur at hava størri samanstillingargjald enn Kvívík, tí hennara arbeiði er størri.

Av tí at áðurnevndu og tílíkir spurningar ivaleyst standa í samband við ta skipan fyri samtalugongd, sum nú er galdandi, skal nevndin loyva sær at siga nøkur orð um hana, eins og nevndin skal vísa á hjálagda brev frá telefonstjóranum, hvarí hann framheldur síni sjónarmið um málið.

Høvuðsvansin við tí núgaldandi skipan er tann, at ein mongd av smáum støðum við lítlum telefonbrúki liggja inni á høvuðslinjum og tarna samferðsluna eftir hesum linjum. Tað er ikki ov nógv sagt, at tað í mongum førum ikki er møguligt at vinna fram við samtalu vegna hesar smáu støður. Endamálið má tí vera at fáa lagt allar smærri støðir inn á hjálinjur sum teymar inn á høvuðsstøðirnar. Øll samanstilling av linjum verður tá gjørd á høuðsstøðunum. Hetta er sjálvsagt eisini samstundis til stórt peningaligt tap fyri telefonverkið, sum eyvitað heldur ikki kann útnyttast til fullnar við eini tílíkari skipan.

Høvuðsstarvið í teimum komandi árum má tí miða ímóti at fáa »system«, plan, í okkara telefonbygging. Nevndin vil tí skjóta uppá, at hesin spurningur verður givin millumtinganevndini saman við telefonstjóranum til umhugsan, og hevur hon til komandi tingsetu et seta uppskot til skipan, ið miðar móti hesum.

Tað vil av tí, ið fram er flutt, skiljast, at so leingi arbeiðið við at »rudda upp« á høvuðslinjunum ikki er liðugt, vil tað vera ógjørligt hjá millumtinganevndini — soleiðis sum tingið samtykti í fjør — at seta fram uppskot til eina fasta skipan fyri samanstillingar. Nevndin skal tí mæla til, at tað verður givið millumtinganevndini heimild til, tá ið týdningarmiklar broytingar eru við samanstillingararbeiðinum hja eini stød, fyribils at áseta hóskandi gjald svarandi til arbeiðið, ið gjørt verður.

Uppskot.

1) Sum árligt fyribilsgjald fyri samanstillingar, roknað frá 1. januar 1937, verður at rinda telefonstøðini í Vestmanna 250 kr. og stødini í Kvívík 200 kr.

2) Annars verður givið telefonmillumtinganevndini heimild til, tá ið tørvur er til tess, at gera neyðturviligar broytingar viðvíkjandi hesum gjaldi.

3) Millumtinganevndin saman við telefonstjóranum verður biðin um gjølla at umhugsa spurningin viðvíkjandi telefonverksins skipan og til komandi tingsetu seta fram uppskot um, hvussu fram eigur at verða farið við hesum arbeiði í komandi árum.

Hans Nolsøe o. fl. framlegði soljóðandi **Ændringsforslag**:

I Stedet for Forslagets Punkt 1 sættes:

Sum árligt fyribilsgjald fyri samanstillingar, roknað frá 1. januar 1937, verður at rinda telefonstøðini í Vestmanna 325 kr. og stødini í Kvívík 200 kr.

Tann 1. desember var broytingaruppskotið samtykt við 16 atkvøðum—0. Uppskot neyndarinnar pkt. 1) var hareftir burturdottið; pkt. 2) og 3) vórðu samtykt við 17 atkv.—0.

---

35. Tráðleys telefon á Stóra Dímun (7/IV)[1]

Telefonnevndin framlegði soljóðandi **nevndarálit**:

Spurningurin um tráðleyst telefonsamband við St. Dímun var til viðgerðar á tingi í setuni 1935, og varð tá samtykt at lata málið upp í hendurnar á millumtinganevndini, sum skuldi kanna eftir, um tað var møguleiki fyri, at vitastýrið vildi taka lut í útreiðslunum viðvíkjandi einum tílíkum telefonsambandi. Vitastýrið hevur svarað í brævi av 2/3. í ár, og sæst harav, at stýrið ikki er hugað til at taka lut í útreiðslunum.

Aftur í ár er umsókn komin frá bóndanum á St. Dímun Ole Jacob Johannesen, um at fáa tráðleyst telefonsamband. Telefonstjórin hevur havt málið til ummælis, og er hetta viðlagt sakina.

Byggikostnaðurin fyri eina slíka lítla stød, sum t. d. kann skiljast í Skúvoy, kanska á Sandi í vanligum líkindum, er mettur til at verða:

Tilfarið til ein lítlan sendara kostar	ca.	75	kr.
Mastrar o. t.	»	150	»
Ymist	»	75	»
Móttakari (telefonverkið eigur ein sovorðnan), virði	»	200	»
Tilsamans	ca.	500	kr.

tá er arbeiðsløn ikki viðroknað.

Byggikostnaðurin er soleiðis ikki stórur og kan tí ikki avgjørt forða fyri, at Dímun fær telefon. Tað, sum kan koma at kosta nakað, er harímóti driftin av stødini, men annars hava royndirnar við teimum smáu stødunum sýnt, at tær eru ógvuliga driftssikrar. Tað hevur soleiðis t.d. enn einki brek verið á telefonsambandinum við Kultur. Av tí, at tað er eittans hús á St. Dímun, verður neyðugt at hava aðra skipan fyri hesa tráðleysu stødina enn fyri hinar.

Tað kann soleiðis ætlast, at Skúvoyar kommuna neyvan vil rinda nakað gjald til hana eins og aðrar gera. Bóndin á Dímun má eisini plikta seg og síni til at passa stødina fyri einki. Nevndin vil eisini halda, at bóndin má vera so sterkt interesseraður í at fáa stødina, at hann lønaleysur vil hjalpa til at flyta góðs og annað neyðturvuligt uppá oynna eins og hann vil hjálpa til við byggingina o. t.

Av tí, at nevndin má rokna við, at bóndin vil nýta móttakaran á

---

1) Sbr. løgtingstíðindi 1935, bls. 58.

stødini til at lurta eftir tíðindum frá úthéiminum, kundi tað kað kanska **verið** grundir fyri at álagt honum eitt lítið árligt gjald fyri brúk av streymi, men má nevndin halda vera beinast at steðga við hesum fyri fyrst. Um hetta og møguligt annað kant, best ætlast, tá ið stødan hevur verið í drift passaliga leingi.

Uppskot.

1) Tingið játtar, at tað fyri telefonverksins rokning verður bygd ein lítil tráðleys telefonstøða soleiðis sum frágreitt í álitinum.

2) Tað undir pkt. 1 umrødda er treytað av, at bóndin pliktar seg til at passa stødina ólønaður.

3) Tað verður givið telefonmillumtinganevndini upp í hendur saman við stjóranum til næstu tingsetu at seta fram uppskot til skipan fyri stødina á St. Dímun.

Tann 22. nov. varð uppskot nevndarinnar samtykt við 17 atkv.—0.

---

36. Bókhaldari við telefonverkið($^{8}|_{IV}$)

Telefonnevndin framlegði soljóðandi **nevndarálit**:

Telefonstjórin hevur umsókn inni á tingi um at fáa bókhaldara, sum eisini kann vera *kassameistari*, settan á telefoncentralina í Havn, soleiðis at verkstjórin fær meira tíð til at taka sær av telefonverkinum sjálvum. Ein slíkur maður má kunna arbeiða heilt *sjálvstøðugt*. Kann hann ikki tað, er tað betri, at tingið gevur verkstjóranum rætt til at seta kassameistara undir egnari ábyrgd. Annars verður víst á í umsóknini, at bæði talið av telefonfelagum sum brúkið av telefonini hevur verið javnt vaksandi í teimum seinru árunum. Um áramóti 1923—24 hevði telefonfelagsgjaldið hjá verkinum eitt árligt virði av o.u. 34000 kr.; men um áramóti 1937—38 liggur virði um 57000 kr. Tann peningur, sum nú árliga gongur um telefonverksins kassa, kann í minsta lagi setast til $^{1}/_{4}$ miljón. Sum meðaltal kann sigast at ganga um 900 kr. dagliga inn og út av telefonverksins kassa.

Nevndin kann vera samd við verkstjóran í, at tað er avgjørt óheldugt, at verkstjórin skal vera so nógv heitur við bókhaldara— og kassameistarastarvið á stødini, at hann ikki kann hava nóg nógva tíð til at taka sær av verksins røkt og virki. Tað síðsta er sjálvsagt hansara høvuðsstarv. Tað er tí løgtingið hevur tikið ein *ingeniør* sum fyristøðumann fyri verkið, at hann skal vera fullkønur í øllum tekniskum spurningum, ið hugsat kunnu at koma at fyriliggja, so verkið teknisk kann vera á hædd við, hvat nútiðin

krevur av eini tílíkari fyritøku. Men umfram hetta, skal fyristøðumaðurin eisini vera *driftsleiðari* av telefonverkinum, t.v.s. vera tann, sum stílar fyri tí dagliga rakstrinum og hevur alla ábyrgdina yvir fyri løgtinginum.

Tað vildi tí eftir nevndarinnar hugsan avgjørt verið eitt brot við ta núverandi skipan, um tingið gongur við til at seta ein bókhaldara og kassameistara, sum skal arbeiða heilt sjálvstøðugt og hava ábyrgdina. Tann núverandi verkstjórin vildi eftir eini tílíkari skipan einans verið tekniskur ingeniørur hjá verkinum, og sum sovorðin bert hava ábyrgdina fyri sjálvt telefonverkið, meðan hin maðurin kom at hava ábyrgdina fyri verksins fíggjarligu støðu.

Nevndin má vera ímóti einum tílíkum tvíbýti og halda tað vera beint, at øll ábyrgdin — tann tekniska so væl sum tann fíggjarliga — liggur á tí eina manninum, á verkstjóranum.

Har afturímóti skal nevndin mæla til, at onnur av teimum elstu telefonkvinnunum á telefonstøðini (Marie Sivertsen ella Johanne Lindenskov) verður sett til at taka sær av bókhaldarastarvinum og um neyðugt eisini av kassameistarastarvinum, tó soleiðis at hesi størv verða hagreidd undir *telefonstjórans umsjón og ábyrgd*. Um neyðugt verður tað givið millumtinganevndini saman við telefonstjóranum heimild til at taka eina nýggja kvinnu til hjálpar á telefonstøðini afturfyri hana, sum tikin verður til bókhaldarastarvið.

Uppskot.

1) Frá 1. januar 1938 verður onnur av teimum elstu telefonkvinnunum (Marie Sivertsen ella Johanne Lindenskov) sett til at taka sær av bókhaldarastarvinum og um neyðugt eisini av kassameistarastarvinum á telefonstøðini í Havn, tó soleiðis, at hon, ið verður sett, kemur at arbeiða undir telefonstjórans umsjón og ábyrgd.

2) Millumtinganevndin saman við verkstjóranum fær heimild til, um tørvur er til tess, at taka eina nýggja kvinnu til hjálpar á støðini afturfyri hana, ið tikin verður til bókhaldarastarvið.

Tann 1. desember varð uppskot nevndarinnar samtykt við 14 atkvøðum—0.

---

37. Fastur tænastumaður hjá telefonverkinum (9/IV)

Telefonnevndin framlegði soljóðandi **nevndarálit:**

Umvølingarmaður (Reparatør) hjá telefonverkinum fyri Sandoynna, Arne Davidsen, á Sandi, søkir í brævi dagsett 4. juli h. á. um at fáa fasta

løn frá telefonverkinum. Umsóknin hevur verið til ummælis hjá telefonstjóranum, og greiðir hann frá, at sum nú er statt, hevur telefonverkið 3 menn á bygd, sum fáa eitt lítið gjald um mánaðin fyri altíð at vera tøkir um á gerst við telefonarbeiði, helst ábót á linjur, hvør innanfyri sín landslut. Hesir menn búgva: á Tvøroyri (25 kr.), á Strondum (25 kr.) og í Klaksvík (15 kr.). Umframt hetta fáa menninir sína dagløn, tá teir arbeiða. Telefonverkið hevur eisini aðrar menn á bygd, sum javnliga gera telefonarbeiði, men einki fast mánaðargjald fáa. Summir av hesum monnum hava tó lítið skil á telefonarbeiði, aðrir duga rættuliga fitt. Millum teirra seinnu er hr. Arne Davidsen, á Sandi.

Av tí Sandoyggin liggur so mikið fyri seg sjálva — tað kenst helst um veturin — er tað neyðugt at hava ein mann í oynni, sum kann rætta brek og gera ymsar nýbyggingar uttan hjálp, og mælir telefonstjórin tí til, at Arne Davidsen umframt vanliga tímaløn fær eitt mánaðargjald fyri at vera tøkur til telefonarbeiði í Sandoynni. Annars heldur telefonstjórin, at tað vildi verið hent at fingi eina fasta skipan fyri, hvussu nógvar fastar »umvølingarmenn« telefonverkið eigur at hava, og hvar teir skulu búgva, og mælir hann til, at hesin spurningur verður givin millumtinganevndini at greiða.

Nevndin kann ásanna tað ið fram er flutt av telefonstjóranum í hesum máli og heldur, at tað vildi verið hent, um millumtinganevndin til næstu tingsetu setti fram uppskot til eina tilika skipan við »føstum« umvølingarmonnum, sum umframt at kunna rætta vanlig brek eisini mugu duga at arbeiða sjálvstøðugt.

Uppskot.

1) Frá 1. januar 1938 verður Arne Davidsen, á Sandi, settur sum »fastur« umvølingarmaður við telefonverkið við einum árligum gjaldi (honorar) uppá 300 kr. umframt vanliga timaløn undir teirri treyt, at hann altíð skal verða tøkur hjá telefonverkinum.

2) Annars verða somu reglur, sum eru gjaldandi fyri hinar av tinginum settu umvølingarmenn, eisini at galda fyri Arne Davidsen.

3) Tað verður givið millumtingvnevndini saman við telefonstjóranum upp í hendi til næstu tingsetu at seta fram uppskot til eina skipan við »føstum« umvølingarmonnum.

Tann 22. november varð uppskot nevndarinnar samtykt við 18 atkvøðum—o.

38. Radiotelegrafsambandið við Suðuroy([10]/[IV])[1]

Telefonnevndin framlegði soljóðandi **Udvalgsbetænkning:**

I sidste ordinære Lagtingssamling behandlede Tinget et Andragende om at faa Telegraftiden for Tórshavn—Suderø Forbindelsen udvidet. Andragendet var underskrevet af en Række fremstaaende Redere og Købmænd fra forskellige Pladser paa Øerne samt Ledere af Institutioner, der har Tilknytning til vort Hovederhverv. I Andragendet henstilles til Tinget om at faa udvirket, at Telegrafen mellem Suderø og Thorshavn bliver aaben paa Hverdage fra Kl. 8 Morgen til Kl. 10 Aften uafbrudt og paa Søn- og Helligdage 3 Gange daglig saavel Sommer som Vinter.

Det fremgaar af den i Sagen afgivne Betænkning, at den samlede Telegraftid paa Hverdage er 3 $^1/_3$ Timer og paa Søndage 1 Time, heri ikke beregnet den Tid, der bruges til meteorologiske Meldinger.

Da den omtalte Forbindelse i sin Tid er etableret af Staten, og da det er denne, evt. i Forbindelse med Store Nordiske Telegrafselskab som Koncessionshaver, der fastsætter de for Thorshavn—Suderø gældende Telegraftider, blev Sagen overgivet til det mellem Tingsamlingerne staaende Telefonudvalg, der ved Forhandling med Ministeriet for offentlige Arbejder skulde søge faa udvirket, at Telegraftiderne blev ændret. I Skrivelse af 18. September d. A. fra Ministeriet for offentlige Arbejder til Statsministeriet, hvilken Skrivelse paa Amtets Foranstaltning er tilsendt Lagtinget til Erklæring udtales: »Driften af den nævnte Forbindelse og af Kystradiostationen i Thorshavn varetages af Det Store Nordiske Telegrafselskab. Der ydes et aarligt Tilskud af Staten paa 1800 Kr. til Driften af Radiotelegrafforbindelsen Thorshavn—Tveraa, men Radioanlæggenes samlede Drift har hvert Aar siden deres Oprettelse i 1917 herudover givet Underskud, for Tiden 1917—1936 gennemsnitlig 10.000 Kr. aarlig. Driftsunderskudet godtgøres Det Store Nordiske Telegraf-Selskab af Post- og Telegrafvæsenet. Indtægten af Radiotelegrafforbindelsen udgjorde det første Driftsaar ca. 7.000 Kr. og steg jævnt til ca. 16.000 Kr. i 1931. Siden har Indtægterne været nedadgaaende, og i 1936 udgjorde de kun ca. 11.000 Kr.

Skønt Indtægterne er dalende, og tilsvarende Nedsættelse af Driftsudgifterne ikke kan gennemføres, anser Ministeriet det ikke for urimeligt, om Beboernes Ønsker om en Udvidelse af Tjenestetiden imødekommes, særlig i Betragtning af, at Størstedelen af Fiskerflaaden er hjemmehørende paa Suderø. Ministeriet mener at kunne gaa med til en Udvidelse af Ekspeditionstiden, saaledes at den bliver den samme som for Bygdernes Telefonstationer, nemlig fra Kl. 8 (Vinter Kl 9) — 20 paa Hverdage og Kl. 9—10 og Kl. 17—19 paa Søn- og Helligdage. Store Nordiske Telegraf-Selskab har erklæret sig villig til Gennemførelse af denne Tjenestetid. Udgiften til Udvidelse af Tjenesten anslaar Selskabet til 5—6000 Kr. aarlig, men da Kabelstationen i Thorshavn direkte eller indirekte vil høste nogen Fordel ved, at det samlede Personale paa Kabel- og Radiostationerne forøges med en Funktionær, vil Selskabet dog gaa med til at afholde Halvdelen af nævnte aarlige Beløb. Derimod mener Post- og Telegrafvæsenet, der som før nævnt — foruden at betale det faste aarlige Tilskud paa 1800 Kr. ogsaa afholder Underskudet af Driften for Thorshavn—Suderø Radiotelegrafforbindelsen, at

[1]) Sbr. Løgtingstíðindi 1936, bls. 71.

det vil anse det for rimeligt, at det resterende Beløb, ca. 3000 Kr. aarlig, saafremt man maatte bestemme sig for Udvidelsen, afholdes af Færø Amt.

Undertegnede Udvalg, hvortil Sagen er henvist, skal særlig med Henblik paa det, der er fremkommet i Sagen siden dens Behandling i Lagtinget i Fjor, fremsætte følgende Bemærkninger:

Man gaar ud fra, at de i oftnævnte Ministeriets Skrivelse anførte forøgede aarlige Udgifter paa 5—6000 Kr., som en Udvidelse af Telegrafforbindelsen med Suderø vil medføre, er saa nær den virkelige Udgift som det paa nuværende Tidspunkt overhovedet er gørligt at fiksere. Dog vil man ikke undlade at bemærke, at da hele Tjenesten paa Telegrafstationen i Thorshavn er en kombineret Tjeneste af Kabeltelegrafi, Radiotelegrafi, Kysttjeneste og delvis ogsaa Radiotelefoni, f. Eks. Vejrtjenesten, vil Fordelingen af Udgifterne paa de enkelte Poster altid i nogen Grad bero paa et Skøn.

Da Staten i 1917 lod etablere Radiotelegrafforbindelsen Thorshavn—Suderø, blev Driften af denne Forbindelse, der besørgedes af Store Nordiske Telegraf-Selskab, alene et Mellemværende mellem dette Selskab og Staten. Færøernes Amtskommunes Telfonvæsen paatog sig ingen økonomiske Forpligtelser overfor Driften. Telegrammernes gebyrfri Besørgelse ad Telefonvæsenets Linjer byggede kun paa de Forudsætninger, hvorunder Kabeltelegrafforbindelsen i sin Tid blev etableret med Øerne. Hvis Lagtinget nu skulde gaa med til af Telefonvæsenets Kasse helt eller delvis at betale, hvad en udvidet Telegrafforbindelse med Suderøen vil koste, vilde man gaa bort fra Forudsætninger, hvorunder Forbindelse i sin Tid blev etableret, uden at Telefonvæsenet derved opnaaede nogen Indflydelse paa Driftens Ledelse. Som Forholdene stiller sig for Øjeblikket, mener man ikke at kunne anbefale, at Lagtinget paatager sig en speciel Forpligtelse i saa Henseende, da al Telegraftrafik til og fra Suderø jo maa betragtes som Statsanliggende, og som Følge deraf saavel trafikmæssig som økonomisk bør ordnes gennem Statens Myndigheder. Paa den anden Side opfylder Radiotelegrafforbindelsen Thorshavn—Suderø med de nuværende Ekspeditionstider langtfra de Krav, Erhvervslivet maa stille til denne som Eneindehaver af den eneste eksisterende Forbindelse af denne Art mellem Suderø og Omverdenen. Man skal derfor atter i Aar indtrængende henstille, at Andragendet fra i Fjor imødekommes med Hensyn til Ekspeditionstiderne som i Skrivelse af 18. September d. A. fra Ministeriet for offentlige Arbejder foreslaaet.

Skulde imidlertid imod Forventning en Ordning af Forholdene paa det *nuværende Grundlag* vise sig uigennemførlig, bemyndiges det mellem Tingsamlingerne staaende Telefonudvalg til at optage de videre fornødne Forhandlinger med Ministeriet om Sagen, eventuelt paa andet Grundlag, da en tilfredsstillende Løsning af Spørgsmaalet ikke taaler yderligere Udsættelse.

Forslag.

1) Lagtinget anbefaler, at Ekspeditionstiderne for Radiotelegrafforbindelsen Thorshavn—Suderø forlænges saaledes, at den bliver den samme som for Bygdernes Telefoncentraler, nemlig fra Kl. 8 (Vinter Kl. 9) til Kl. 20 paa Hverdage og fra Kl. 9 til 10 og fra Kl. 17 til 19 paa Søn- og Helligdage.

2) For saa vidt en Ordning af den økonomiske Side af Sagen ikke kan træffes paa det nuværende Grundlag, bemyndiges det mellem Samlingerne staaende Telefonudvalg til under Hensyntagen til det i Betænkningen anførte at søge hidført en snarlig Løsning af Spørgsmaalet.

Tann 10. desember varð uppskot nevndarinnar samtykt við 20 atkvøðum—0.

---

39. Telefonfelagsgjald fyri jarðamøður (11/IV)

Telefonnevndin framlegði soljóðandi **nevndarálit**:

Telefonstjórin vísir á í brævi av 30/10. í ár, at løgtingið eina ferð hevur latið »Distriktsjordemødre« fingið telefon fyri hálvt telefonfelagsgjald. Av tí at ljósmøður eiki hava og aldri hava havt nakað við driftina av telefonverkinum at gera, hevur tingið harvið álagt verkinum eitt árligt gjald, sum er vorðið størri eftir tað, at verkið frá 1. januar 1936 skal lata 10 kr. árliga til bygdastøðir fyri hvønn felaga við fríum innanbýggja samtalurætti. Annars er tað bert telefonverksins føstu menn á bygd og í Havn, sum lata hálvt telefonfelagsgjald. Telefonstjórin mælir til, at løgtingið tekur støðu viðvíkjandi spurninginum um gjald til bygdastøðir við 10 kr. av telefonfelaga, tá felagsgjaldið bert er hálvt, og somuleiðis kannar eftir, um tað er rætt, at telefonverkið, sum eiki hevur við skipanina viðvíkjandi »Distriktsjordemødre« at gera, skal gjalda helmingin av telefonfelagsgjaldi til ljósmøður í Føroyum, tá løgtingið, sum eigur telefonverkið, altíð sjálvt hevur goldið fullt telefonfelagsgjald. Telefonstjórin ræður til at fáa hetta broytt.

Sjálvandi kann nevndin vera á einum máli við telefonstjóran um, at tað hvørki er ella nakrantíð hevur verið nakað beinleiðis samband ella skyldskapur millum hesi tvey mál. Tó má tað kanska verða loyvt nevndini at vísa á, at heilt uttan samband eru hesi mál tó ikki, av tí at tað valla kann hugsast, at hvørki teir núverandi ella komandi telefonfelagar verða bornir í heim uttan hjálp av ljósmøður, og tað má sigast at vera høvuðstreytin fyri, at telefon verður nýtt. Ta kann tí sigast, at teirra starv er av almiklum samfelagsligum týdningi, um ikki á sama hátt sum telefonverksins. Tað er ivaleyst út frá hesum sjónarmiði, at løgtingið hevur ásett, at ljósmøður skulu sleppa við hálvt gjald. Soleiðis sum ávist av stjóranum er støðan broytt nakað við tað, at telefonverkið frá 1. januar 1930 skal rinda bygdastøðunum 10 kr. fyri hvønn telefonfelaga í bygdini við fríum innanbýggja samtalurætti. Hesin rætturin kostar úti á bygd 15 kr. árliga; helmingurin harav er 7 kr. 50 oyr. Tá ið telefonverkið skal rinda støðini 10 kr. og bert fær 7 kr. 50 oyr. hevur tað soleiðis eina beinleiðis útreiðslu uppá 2 kr. 50 oyr. av tílíkum telefonfelagum; hetta má sigast at vera óhóskandi. Av tí, tað kann sigast at vera av samfelagligum týdningi, at jarðamøðurnar hava telefon, vil nevndin mæla til, at tær í framtíðini eins og nú skulu fáa telefon fyri hálvt gjald *uttan frían samtalurætt innanbýggja*. Yntskja tær eisini henda rættin, mugu tær sjálvar ella tann ávarandi kommunan betala fullt gjald harfyri. Av tí at telefonverksins tænastafólk beinleiðis eru í verksins tænastu, heldur nevndin ikki vera grund til at broyta hesa skipan teimum viðvíkjandi.

Uppskot.

Nevndin mælir tinginum til at fasthalda, at jarðamøðnr í framtíðini eins og higartil skulu kunnu gerast telefonfelagar fyri hálvt gjald, tó uttan frían innanbýggja samtalurætt. Ynskja tær eisini henda rættin, mugu tær rinda fullt gjald fyri hann.

Tann 18. november varð uppskot nevndarinnar samtykt við 18 atkvøðum—0.

---

40. Telefonstjóraembætið([12]/IV)[1]

Telefonnevndin framlegði soljóðandi **nevndarálit**:

Tann kst. telefonstjórin L. Zachariasen nemur í brævi til telefonnevndina, dagsett 25. okt. í ár, við ymsar spurningar, sum nevndin verður biðin um at taka støðu til, nú spurningurin um at geva stjóranum fast pláss í embætinum sum verkstjóri við telefonverkið og lønviðurskifti hansara skulu koma til viðgerðar.

Í áðurnevnda brævi verður hildið fram:

at tingið í 1926 hevur veitt Andr. Niclasen, montøri, eftirløn fyri áramál galdandi frá 1919, tá hr. Niclasen fekk fasta løn við telefonverkið,
at tað vildi verið í samljóð hervið, um tingið viðvíkjandi hansara eftirløn hevði roknað við tíðini frá 1. oktober 1926, nú hann kemur at virka í embætinum sum verkstjóri við telefonverkið,
at verkstjórin, sum nú fær løn eftir somu skala sum postkontrollørar og ingeniørassistentar, *ikki* hevur rætt til nakað gjald útyvir sína løn,
at hin verkstjórin, sum var hægri løntur, fekk 800 kr. til hald av húsum (Huslejegodtgørelse) um árið,
at vanligur siður er, at ein stjóri umfram løn sína fær eitt eykagjald (samsýning fyri ymsar útreiðslur, sum hann — sjálvt um hann ikki ynskir tað — noyðist at hava sum stjóri).

Annars vísir verkstjórin á, at Bornholms Telefonselskab lønar sínum stjóra við grundløn kr. 7200 um árið; eftir 6 ár gongur lønin upp í kr. 8400. Heraftrat fær stjórin tey fyrstu 3 árini av sínl tænastutíð 2000 kr. árliga sum »Bestillingstillæg«. Hetta »Bestillingstillæg« hækkar eftir 12 árs tænastutíð til 3500 kr.

---

[1]) Sbr. Løgtingstíðindi 1936, bls. 63.

Málið um »telefonstjóraembætið« var til viðgerðar í tí vanligu tingsetuni í fjør, og samtykti tingið soljóðandi uppskot:

1) Fra 1. Oktober d. A. ansættes Ingeniør Louis Zachariasen som Driftsbestyrer for Færø Amtskommunes Telefonvæsen og lønnes i Henhold til Lov af 12. September 1919, jfr. Lov af 31. Marts 1931 om Statens Tjenestemænd 6. Lønningsklasse for Post- og Telegrafvæsenet, med Begyndelsesløn 5040 Kr., stigende hvert 3. Aar med 360 Kr. indtil 5760 Kr.
2) Lønnen for det første Aar vil, uanset at det er et Prøveaar, være at beregne i Henhold til de under Pkt. 1) indeholdte Lønningsbestemmelser, som om han havde fast Ansættelse, og skal dette, naar fast Ansættelse foreligger, iberegnes Driftsbestyrerens Tjenestealder.

Nevndarinnar støða viðvíkjandi sjálvum lønspurninginum hjá telefonstjóranum er tann sama í ár sum í fjør, og skal hon tí mæla til, at ingeniør Louis Zachariasen frá 1. oktober í ár verður settur fastur í plássið sum verkstjóri og driftsleiðari av telefonverkinum undir teim av tinginum í fjør ásettu løntreytum, tó soleiðis, at royndarárið eisini verður roknað við í hansara tænastamannaaldur.

Í áðurnevnda brævi frá telefonstjóranum verður sagt, at hann eftir tí núverandi lønskipan *ikki* hevur rætt til nakað gjald út yvir sína løn. Um hann hervið sipar til eftirløn, er hetta ikki beint, tá tann núverandi lønlønskipan eisini tryggjar honum eftirløn. Viðvíkjandi spurninginum um at rokna eftirløninа hjá verkstjóranum frá 1. oktober 1926 heldur nevndin, at tað fer ikki at bera væl til at geva honum eftirløn sum verkstjóri fyri eitt tíðarskeið, tá hann bert hevur verið honorarlønaður funktionerur. Har aftur í móti heldur nevndin, at tað vildi verið hóskandi, um Zachariasen eins og telefonstjóri Jacobsen fekk eitt hóskandi gjald til hald av húsum (Huslejegodtgørelse), og vil nevndin seta fram uppskot herum.

Viðvíkjandi tí,ið fram er flutt um viðurskiftini á Borðholm, er at siga, at tað kann vera forvitnisligt, men er nevndin á einum máli um, at tílík lønskipan er óhóskandi fyri føroysk viðurskiftir.

Uppskot.

1) Frá 1. oktober 1937 verður ingeniørur Louis Zachariasen fastur verkstjóri og driftsleiðari av telefonverkinum, og skal hann lønast eftir lóg av 12. september 1919, sbr. lóg av 31. mars 1931 um statins tænastumenn 6. løningarklassa fyri post- og telegrafvesinið, við eini byrjunarløn 5040 kr., hækkandi 3. hvørt ár upp til 5760 kr.

2) Eftirlønartíðin hjá verkstjóra L. Zachariasen verður at rokna frá 1. oktober 1936

3) Umfram tað undir pkt. 1) ásetta skal verkstjórin hava eitt árligt gjald uppá 500 kr. til hald av húsum (Huslejegodtgørelse).

Tann 1. desember varð uppskot nevndarinnar sett undir atkvøðisgreiðslu við navnakall og varð samtykt við 21 atkv.—0. (A. Samuelsen og M. Samuelsen *atkvøddu ikki* og Paturssón var *burtur*).

---

41. Eftirløn við telefonverkið(13/IV)

Telefonnevndin framlegði soljóðandi **Udvalgsbetænkning:**

Den kst. Driftsbestyrer for Telefonvæsenet, Hr. Zachariasen, har under 20. f. M. tilsendt undertegnede Udvalg en Skrivelse, hvori henstilles, at Spørgsmaalet om Pensionering af de ved Amtskommunens Telefonvæsen ansatte Tjenestefolk tages til Behandling.

I Skrivelsen fremhæves, at Reparatør Andreas Niclasen er den eneste af det ved Telefonvæsenet ansatte Personale, der er berettiget til Pension. I 1928 vedtog Tinget »Reglur um pensión fyri tænastufólk við telefonverkið«, og er disse i Overensstemmelse med de for Personalet ved Sanatoriet i Hoydal gældende Pensionsregler (jfr. Færøsk Lovsamling Bind II, Side 233—234). Den nuværende Pensionsfond ved Telefonvæsenet er paa ca. 14.500 Kr., og det er selvfølgelig alt for lidt. Hr. Zachariasen foreslaar derfor, at der af Telefonvæsenets Kasse ydes et aarligt Tilskud paa 5000 Kr., indtil Pensionsfonden har naaet en Størrelse paa ca. 100.000 Kr. Først da vil den svare til sin Hensigt, nemlig at kunne afholde de ydede Pensioner uden at behøve at angribe Grundfonden. I Skrivelsen udtales, at en yderligere Udsættelse af Retten for de enkelte ved Telefonvæsenet fast ansatte Funktionærer til at udnytte den af Lagtinget i 1928 skabte Ordning vanskelig kan fastholdes, ligesom det vil være nødvendigt ved større aarlige Tilskud at faa Pensionsfonden bragt op paa en passende Størrelse.

Spørgsmaalet om Pensionering af Personalet ved Telefoncentralen i Thorshavn samt de ved Telefonvæsenet fast ansatte Reparatører (de 3 Brødre Poulsen) har flere Gange været underkastet indgaaende Behandling i Tinget, hvorfor man i Hovedsagen kan indskrænke sig til at henvise til Lagtingets tidligere Udtalelser i denne Sag (jfr. Lagtingstidende 1928, Bilag 35, 1934, Side 42—46).

Naar Tinget trods adskillige Henvendelser ikke har ment at kunne imødekomme Andragerne, saa skyldes det særlig den Omstændighed, at man har været klar over, at i samme Øjeblik, det ved Telefoncentralen i Thorshavn ansatte Personale blev pensionsberettiget, vilde det samme Krav ganske naturligt ogsaa blive rejst af det tjenstgørende Personale ved samtlige Bygdestationer, og at Telefonvæsenet i hvert Fald i Øjeblikket savner Midler til at imødekomme et saadant Krav, kan der formentlig næppe være delte Meninger om.

Forholdet er om muligt blevet endnu vanskeligere efter at Lønordning af 1. Januar 1936 er traadt i Kraft, hvorefter flere af de større Bygdestationer i Virkeligheden ogsaa lønnes af Telefonvæsenet og saaledes

praktisk taget arbejder under en Lønordning, der kan sidestilles med den, der er gældende for Personalet ved Telefonstationen i Thorshavn — kun at den for de førstes Vedkommende er langt ringere: Det er desuden en Kendsgerning, at Bygdestationerne nu i højere Grad end tidligere regner med at sortere under selve Telefonvæsenet, eftersom det nu er *Telefonvæsenet*, der bestemmer, hvem der skal antages, naar Talen er om enten Flytning eller Opførelse af en ny Station ude paa Bygderne. Tidligere var det som bekendt Forstanderskaberne, nu har disse kun *Indstillingsret*.

Udvalget er iøvrigt af den Opfattelse, at Spørgsmaalet om Pension for Thorshavns Vedkommende allerede er ordnet, idet der allerede i 1920 er gennemført en Ordning, som er at opfatte som en Slags Pensionsordning, der tilsigter at sikre veltjente Funktionærer en sorgfri Alderdom. Den omtalte Vedtagelse er saalydende: »Ved Afskedigelse, der sker paa Grund af Alderdom, beholder vedkommende en Del af sin Løn som Pension. Pensionens Størrelse og øvrige Forhold fastsættes af Lagtinget.«

Udvalget maa derfor være af den Formening, at Lønningsforholdene ved Telefoncentralen i Thorshavn i det hele taget maa siges at være forsvarlige — sammenlignet med Bygdestationernes helt gode — og kan under Hensyn hertil ikke tilraade, at Andragendet imødekommes.

Forslag.

Lagtinget mener ikke at kunne imødekomme foreliggende Andragende om Pension.

Tann 25. november varð uppskot nevndarinnar samtykt við 20 atkvøðum—0.

---

42. Pakkhús á havnarplássinum ($^{14}|_{IV}$)

Telefonnevndin framlegði soljóðandi **nevndarálit:**

Telefonstjórin minnir í brævi dagsett 25. oktbr. í ár tingið á, at telefonverkið leigar eitt stykki av havnarplássinum í Havn, stórt 18×20 m, fyri 980 kr. um árið, og hevur hetta higartil verið nýtt til at leggja telefonsteyrar og ymsar kaðalár á, sum verkið hevur liggjandi niðurfyri. Stjórin heldur, at telefonverkið fær ov lítla nýtslu burtur úr hesum plássi eftir peningagjaldinum, og ein økjan av nýtsluni kann best fáast við at byggja á stykkið. Spurningurin um at byggja eigur tí at verða umhugsaður. Sum nú er statt hevur telefonverkið bert brúk fyri hjallarahædd í einum húsum á havnarplássinum og avskiladari goymslu til steyrar, sum væl kunnu vera úti.

Av tí at nevndin heldur seg vita, at telefonverkið fekk stykkið á

havnarplássinum til leigu undir teirri treyt, at verkið skuldi byggja á tí innan eitt vist tíðarskeið, og henda tíðarfroyst er útrunnin, uttan at treytin er lokin, vil tað tí verða neyðugt nú at taka støðu til byggispurningin. Nevndin má halda, at tann núverandi leiga er alt ov høg, og tá so er, at telefonverkið bert hevur brúk fyri einum húsi upp til hjallarahædd, er kanska vert at taka til umhugsunar, um telefonverkið ikki kann fáa lagaligt pláss aðra staðni fyri bíligari leigu og við hóskandi goymslurúmi uttan at byggja. Hetta málið kann ivaleyst best kannast í millumtinganevndini, og skal nevndin mæla til, at tað verður sent til viðgerðar har.

Uppskot.

Málið viðvíkjandi framvegis leigu og møguligari bygging á stykkinum yviri á havnarplássinum verður givið millumtinganevndini til viðgerðar, og hevur hon at leggja sína støðu til málið fram aftur fyri tingið í næstu setu.

Tann 26. november varð uppskot nevndarinnar samtykt við 18 atkvøðum—0.

---

43. Telefonverksins luttakan í skipakeypi ($^{15}|_{IV}$)

Telefonnevndin framlegði soljóðandi **greint uppskot:**

Tingið kann, sum statt er, ikki taka avgjørda støðu til fyriliggjandi mál, og skal nevndin mæla til at málið verður givið telefonmillumtinganevndini at greiða.

Uppskot.

Málið um telefonverkið skal taka lut í keypi av skipi til kaðalarbeiðir verður givið telefonmillumtinganevndini at greiða.

Tann 11. desember varð uppskot nevndarinnar samtykt við 13 atkvøðum—0.

V. Sjúkrahús, læknar o. t.

44. Bróstsjúkrahúsið í Hoydølum (1/V)[1]

Bróstsjúkrahúsnevndin framlegði soljóðandi **nevndarálit**:

Hin 9. oktober í ár varð vald bróstsjúkrahúsnevnd. Nevndin hevur fingið útskrift av gerabókini fyri bróstsjúkrahúsnevndina, ið sitið hevur tingseturnar millum, og ársyvirlit fyri 1936, hvarí eisini finst yvirlit yvir roknskapin fyri 1936. Roknskaparyvirlit fyri 1sta árshelming av 1937 er eisini lagt fyri nevndina.

Grannskoðaður roknskapur fyri 1936 er framlagdur, og setur nevndin fram uppskot um, at hesin roknskapur og tað ið millumtinganevndin hevur avgjørt verður góðkent. Roknskapurin fyri 1936 vísir eitt undirskot uppá kr. 12.580,57, og verður hetta eftir avgerð løgtingsins av 2/12. 1936 (sbr. tingm. nr. V—2,1936) goldið úr amtsgrunninum. Undirskotið fyri 1936 er soleiðis um 6900 kr. hægri enn tilætlað, og kemur hetta av, at ein rokning fyri elektricitetsnýtslu í 1935 ikki er komin við fyrr enn í 1936, og at ymiskar útreiðslur sum t. d. hiti og ljós hava verið væl hægri enn tilætlaðar.

Roknskapurin vísir, at útreiðslurnar til kostarhald hava verið:

	1935	1936
pr. sjúklingadag	164,38 oyr.	169,00 oyr.
- kostardag	132,28 »	136,00 »

og at hesar útreiðslur soleiðis eisini hava verið vaxandi.

Millumtinganevndin hevur avgjørt:

5/2. 1937: at fluttningsútreiðslur til dr. Lynge, kr. 666,67, eru goldnar av bróstsjúkrahúsinum,

23/3. — at kommunulækni frk. Nicolajsen sum endurgjald fyri bilkoyring til og frá bróstsjúkrahúsinum fyri eitt ár fær 600 kr., hvarav tó 200 kr. verða afturgoldnar av Havnar kommunu,

12/4. — at umvøla hegnið frá brúnni yvir Hoydalsá til Hoyvíksgarðar og hevur við royndarstøðina í Hoyvík fingið ein sáttmála í lag um at støðin setur upp hegn, soleiðis at stórdýr ikki koma inn á fløtuna frammanfyri bróstsjúkrahúsinum,

9/6. — at nevndarformaðurin frá 1. juli í ár fær heimild til at disponera viðvíkjandi kassakredittinum hjá bróstsjúkrahúsinum, herundir at undirskriva checkar,

— — at tær 10.000 kr., ið lántar eru úr jarðalhvalsgrunninum eru at skilja sum eitt lán, ið verður at afturrinda,

[1] Sbr. løgtingstíðindi 1936, bls. 82.

36/9. 1937: at frk. Helene Marie Jacobsen er sett sum sjúkrasystur frá 1. oktober í ár, fyribils fyri eitt ár, í staðin fyri Dagmar Hansen, ið hevði sagt upp.

Til umhugsan í millumtinganevndini hava verið ymisk mál, sum eru útsett til avgerð av tinginum.

Hesi mál eru:

1) Afturrindan av láni úr jarðahvalsgrunninum, 10.000 kr.
2) Spurningurin um leingjan av kontraktini við royndarstøðina í Hoyvík.
3) Umsókn frá yvirjúkrasystur Marie Johannesen um lønhækkan.
4) Kostnaðarætlan viðvíkjandi ymiskum umvælingum á sjúkrahúsinum.
5) Kostnaðarætlan viðvíkjandi einum hjalli til yvirlæknan.
6) Tilboð frá Edw. Smith viðvíkjandi einum rustfrium vaski til køkin.

ad 1) Nevndin heldur ikki, at bróstsjúkrahúsið verður fært fyri at afturrinda tær úr jarðahvalsgrunninum lántu 10.000 kr., og at hesin peningur tí eigur at verða roknaður sum eitt tilskot; men setur nevndin tó ikki fram uppskot herum, av tí at tað er nevndini kunnigt, at tílíkt uppskot kemur fram í einum øðrum máli.

ad 2) Kontraktin við royndarstøðina í Hoyvík gongur ikki út fyrr enn til 20. sept. 1939, og er tað tí ikki neyðugt longu nú at taka avgjørda støðu til málið. — Nevndin hevur haft á máli um sjúkrahúsið ikki sjalvt kann dríva eitt landbrúk haruppi og mælir tí til, at millumtinganevndin til komandi tingsetu fetur gera ein fíggjarætlan fyri einum landbrúki í Hoydølum, herundir eisini kostnaðarætlan yvir byggningar til tess.

ad 3) 1. februar 1938 verða tað 3 ár síðani frk. Marie Johannesen varð sett sum yvirsjúkrasystur. Nevndin mælir til, at umsóknin um lønhækkan verður játtað, soleiðis at lønin verður 1800 kr. um árið frá 1. febr. 1938 at rokna, men lóyvir sær samstundis at halda fram, at henda avgerð ikki bindur tingið til at geva yvirsjúkrasystrunum, ið seinri verða settar, somu løn, ella til at hækka lønina hjá hinum sjúkrasystrunum, og at henda løtin eigur at roknast sum hægsta løn, ið gjaldast kann.

ad 4) Nevndin, ið hevur verið uppi á sjúkrahúsinum og haft samráðingar við starvsfólkið har, heldur at húsini mugu sigast at vera í tolulíga góðum standi. Har eru tó ymiskar umvølingar, ið mugu gerast, og kunnu útreiðslurnar til viðlíkahald tí ikki setast lægri enn til 4500 kr.

Hesi arbeiðir eiga at verða gjørd í komandi ári:

Í vognhúsinum.

Uppmúran av 3 útvatningsíløtum í 70 cm. hædd. Innan og uttan av hvítum glaseraðum steinum og rúmið sjálvt í somu hædd av sama tilfari. Veggir og loft verða at klæða við pløddum brettum og ferniserað. Neyðturvuligur vatnleiðingur at innleggja.

Á nýggju deildini.

a. Tættningslistar til 10 vindeygur.
b. Umvøling av septic-tankanum.

Á gomlu deildini.

a. 4 úthurðar av teaktræ til altanarnar.
b. Tættningslistar til 24 vindeygur.
c. 1 úthurð til verkstaðið.

ad 5) d. Rustfritt vask og plátur rundanum vaskið í køkinum.

ad 6) Yvirlæknin hevur framsett ynski um at fáa ein hjall til læknahúsini. Eftir fyriliggjandi kostnaðarætlan er roknað við einum hjalli uppá 5×8 al. Nevndin heldur, at ein hjallur er neyðugur, men at støddin betri hóskandi kann setast til 5×6 al., hvarvið útreiðslurnar verða 200 kr. minni, og setur tí uppskot fram um byggjan av einum hjalli uppá 5×6 al.

Nevndin mælir til, at øll hesi arbeiðir verða útbjóðaði.

